## Minningarorð um
# Karl Johansen



Fríggjadagin 15. februar andaðist Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, bert 67 ára gamal.

Fyri fáum vikum síðani hátíðarhelt felag hansara ein merkisdag, tá Karl hevði verið formaður í felagnum í samfult 25 ár. Lítið vardi nakran hesa hugnaligu løtuna, at hetta var síðstu ferð vit hittu hann. Sjálvt um Karl alment hevði sagt, at nú ætlaði hann at gevast í fakfelagsarbeiðinum, so sat hann enn við róðrið, nú hansara fjørður so brádliga var rógvin.

Lítil ivi er um, at Karl um nakar, hevur myndað arbeiðarrørsluna seinastu fjórðingsøldina. Hann hevði sínar greiðu meiningar og dugdi at framføra tær. Men tað vóru ikki tóm orð, hann hevði eisini hegni til at umseta orð til handling.

Í 1985 fekk Havnar Arbeiðsmannafelag sett ein eftirlønargrunn í verk. Her vísti Karl at hann var framsíggin, og henda skipan má sigast at verða ein varði yvir hansara virki innan fakfelagsrørsluna.

Verandi nevnd í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og teir sum hava sitið í nevndini tíðarskeiðið, har Karl hevur verið formaður, bera honum alt tað besta. Sjálvandi hevur langt frá altíð verið semja um alt millum partarnar, men ongantíð var nakað agg. Tað bar altíð til at tosað um tingini, og tá ein semja var komin undir land, kundi tú vera vísir í, at Karl stóð við sítt orð. Og tað óansæð um nakað var skrivað niður ella ikki.

Greitt er, at tað ikki verður nøkur løtt uppgáva at lyfta arvin eftir farna formannin.

Við hesum orðum vilja vit lýsa frið yvir minni um Karl Johansen.

Vegna nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vilhelm M. Johannesen,
formaður

# Hans Mikkelsen av Toftum

**f. 6. sept. 1923 d. 23. febr. 2002**



"Á morgni árla vit Guði lova". Vakri sálmurin, sum A.C. Evensen týddi úr norskum og H.J. Højgaard gjørdi lag til, fyllir Fríðrikskirkjuna á Toftum henda kavaklædda mikudag í februar.

*"Á morgni árla vit Guði lova,*
*sum lærdi okkum so trygt at sova*
*í Jesu navni um náttartíð*
*sum børn á armi hjá móður blíð."*

Síggi fyri mær mannin, sum liggur í hvítu kistuni frammi í kirkjuni. Ljóslivandi. Júst komin aftur av skipi. Hugagóður og fullur av lívi stendur hann og syngur í kórinum hjá lokala meistaranum Hans J. Højgaard. Vakra tenorrøddin klingar so væl saman við hinum røddunum í kórinum.

Síggi hann fyri mær rokast í túninum, í stiganum, á tekjuni. Tað er so nógv hann vil náa meðan hann er heima millum túrarnar.

Ein sólstrála sær varisliga innar í kór. Og sníkir seg yvir til kistuna, sum glóvar so vakurt.

Hugsi, tað var løgið at Hans Mikkelsen, sum var so arbeiðssamur og fullur av lívi, skuldi fáa tað so strævið tey seinastu árini hann livdi her á fold. Sjúkan, sum varð staðfest í 1984, gjørdist hervilig. Breyt niður likamið, spakuliga, men miðvíst.

Men ta innaru sólstráluna megnaði sjúkan ongantíð at sløkkja. Hon var har javnt og samt. Og hóast ongin rødd var eftir í síðstuni, og hugurin viðhvørt var fráverandi, ja so skilti tú altíð svarið, tá tú spurdi hvussu hann hevði tað. "Gott". Ongantíð hoyrdi tú hann gremja seg. Ongantíð. Tolsemið má vera Guðs størsta gáva, ikki minst í slíkari støðu sum Hans var í.

Hesi árini sjúkan hevur merkt hann, man Hans stundum hava reikað aftur í tíðina. Ja heilt aftur í barnaárini.

Faðirin Jákup Mikael mintist hann av góðum grundum ikki. Var bara eitt ára gamal tá hann druknaði í Íslandi við sluppini Onnu. Karolina í Torbisgerði var ein av einkjunum í Toftatúni, sum eftir hesa ræðuligu vanlukku sat einsamøll eftir við børnunum. Fýra vóru børnini. Tað yngsta bar hon undir belti tá maðurin doyði, og hann varð nevndur eftir pápanum.

Karolina var ein sonn arbeiðsrót. So mikið væl kláraði hon at breyðføða familjuna, at hon harumframt tók eina bróðurdóttir til fosturs.

Stóri dreymurin hjá lítla dronginum var at sleppa í handverkaralæru. Men so skuldi ikki verða. Tí so títt og knapt árini vóru nóg nógv og kreftirnar rukku, fekk Hans kjans við skipi. Og so bleiv hansara lívsyrki á sjónum.

Havi ofta hoyrt frá monnum, sum vóru til skips saman við Hans Mikkelsen, at ordiligari og reiðiligari manni hava teir ikki verið saman við. Lepar fylgdu ikki við tá Hans hevði verið uppi í leikinum. Ósjálvsøkin og ærukærur sum hann var, legði hann altíð fulla orku í uppgávuna, hvat tað so var.

Og teir ungu, sum fyrstu ferð vóru til skips, áttu í Hans altíð ein góðan vegleiðara og vin. Eisini eftir at hann hevði verið uppá skúla og sigldi sum bestimaður og hendinga ferð var skipari.

Í 1956 giftist Hans við Ingu Mariu, Inger, úr Gerðinum. Í Torbisgerði bygdu tey eitt gott og trygt heim, har teirra fýra børn vuksu upp. Inger røkti heimið til lýtar og stór var gleðin á teimum smáu, tá pápin kom heim. Tá hevði hann ofta verið burtur í eitt hálvt ár.

Sjálvt um Hans var ógviliga veikur seinastu tíðina, eydnaðist tað honum at vera heima í Torbisgerði nærum til tað síðsta. Við stórum trúfesti var Inger um mann sín. Hon hevði ikki gloymt lyftið hon gav tann dagin tey vórðu vígd í gomlu Nes kirkju.

Hans Mikkelsen var maður, ið gjørdi lítlan háva burtur úr sær sjálvum. Men hansara ídni og vinsemi gjørdu, at hann fylti nógv har hann var. Tað prógvaði stóri skarin, ið savnaðist í Fríðrikskirkjuni henda kavaklædda mikudag í februar.

*"Øll tann mikla trongd og neyð,*
*sum tær foldarlívið beyð,*
*tykist tá sum dreymur ein,*
*nú er ævin long og rein."*

Ærað verið minnið um Hans Mikkelsen av Toftum.

**toftamaður**


Vor kære mor, svigermor, mormor, farmor og oldemor

**Tove Helene Mommer**
(født Prener)

f. 14. januar 1926
er stille sovet ind d. 12. marts 2002

***...vær brændende i ånden! Tjen Herren!***
***Rom. 12.11***

**Benedicte, Ole, Per, Gene, Lone, Mette**
**Rebecca, Andreas, Isabel, Katrine**
**Christian, Annmarie, Lucas**

Begravelsen finder sted mandag 18. marts kl. 14.00
fra Københavns Kristne KulturCenter, Drejervej 15,
2400 København NV



## Laaaaannngt vikuskifti í Aberdeen

*hósdag til mánadag...ja!*




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær, bæði til gaman og álvara. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu frálíku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum.

Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

**Íroknað er** flogferð, fýra nætur á dupultkamari við morgunmati og ferðaavgjøld.
Tilboðið er galdandi til 1. apríl.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 19.00.

SANSIR · TEL 355 355

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo









# Føstu og páska tónar í kirkjunum í Vestmanna og Gøtu

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Í morgin, sunnudagin, fara Vestmannakórið, ein sangkvintett og organisturin Oddvør Johansen at framføra føstu og páska tónar í kirkjunum í Vestmanna og Gøtu.

Sangkvintettin, við Marit Mordal, Petru Iversen, Berghild Poulsen, Hans Iversen og Peter Hentza Niclassen, syngur mest tónleik við orgulfylgispæli eftir Gabriel Fauré.

Vestmannakórið, undir leiðslu av Kára Bæk, fer at syngja nakrar av teimum mest nýttu sálmunum, har ørindini stundum verða sungin av kórinum, stundum av kvintettini og stundum av kirkjuliðnum/áhoyrarunum.

Eisini syngja tey saman tað kenda kórverki »Miserere mei, Deus« sum italienarin Gregorio Allegri skrivaði í fyrru helvt av 1600 árunum. Verki var einans sungi í dymbildagavikuni í einum av kappellunum runt Pæturskirkjuna. Í næstan 200 ár var tað bannað at syngja verkið uttan fyri kapelli.

Føstutónarnir verða at hoyra í Vestmannakirkju kl. 16.00, og í Gøtukirkju kl. 20.00.


